# Grikkaland er feriuparadís

Nógv sól, vakrar stendur, mentan og søga, góður matur og stórt gestablídni. Tað eyðkennir Grikkaland sum ferðamannaland.

Mest sum hvørt einasta hús ella íbúð hevur eina balkon, har blómurnar strála, og nógvar av gøtunum og torgunum í býnum breiða seg út við appilsintrøum – jú Grikkaland er eitt serstakt upplivilsi.

Í grikska oyggjahavninum finnast ein ørgrynna av oyggjum, og tað verður tikið til, at grikkar hava eina oyggj til hvørt huglag. Tú kanst hugna tær saman við teimum ungu á Ios ella bara njóta friðin á einari av teimum mongu ferðamannaoyggjunum. Og um tú hevur hug til eitt sindur av "island shopping", so kann tað avgjørt viðmælast.






















